Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tel. 35 50 50
Faks 35 50 55
mmr@mmr.fo
www.mmr.fo

# Mentamálaráðið

Mentamáladeildin

## Fulltrúi

Í sambandi við, at Fólkakirkjan verður yvirtikin er eitt áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv sum fulltrúi leyst at søkja í Mentamálaráðnum.

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:
- Fyrireika yvirtøkuna av Fólkakirkjuni og í hesum høpi serstakliga:
  - At taka lut í lógar- og kunngerðararbeiði í sambandi við yvirtøku av Fólkakirkjuni
  - At røkja samskiftið við allar partar av fólkakirkjuni í yvirtøkutilgongdini
  - At tryggja, at tilgongdin verður so trygg og dygdargóð sum møguligt við atliti at yvirtøkulóggávuni
- At fyrisita lóggávuna um Fólkakirkjuna, tá ið kirkjan er vorðin yvirtikin
- At fremja málsviðgerð í málum, ið viðvíkja málsøkinum Fólkakirkja
- At tryggja menning og samstarv og at røkja samskiftið við kirkjuliga landslagið og við allar partar í fólkakirkjuni
- At arbeiða við verkætlanum og uppgávum
- At ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, dagføra lóggávu og tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvari við nútímans fyrisitingarlig krøv.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:
- hava útbúgving frá lærdum háskúla
- kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- vera tænastusinnaður, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava góðan kunnleika til føroyskt, danskt, enskt og at nýta KT
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Talan er um eitt nýtt starvsøki, og góðir møguleikar eru fyri at ávirka, hvussu arbeiðið verður skipað.

Mentamálaráðið arbeiðir við elektroniskari skjala-handfaring, og er fyrisitingin tí við at gerast pappírsleys. Upplæring fæst í hesi skipan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmans–skrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skal sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. januar 2006, kl. 16.00.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Petur Petersen, aðalstjóra á tlf. 35 50 50 ella Kristiannu Sjóvará Jacobsen, fulltrúa á tlf. 35 50 36.

*__Mentamálaráðið__ hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti, og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í __Mentamáladeildini__ er deildarstjóri og 3 fulltrúar. Ætlanin er, at Fólkakirkjan skal vera yvirtikin 1. januar 2007. Nýggi fulltrúin verður við til at gera neyðugar fyrireikingar í sambandi við yvirtøkuna og eftir yvirtøkuna umsita málsøkið.*



# Setús á Øksnagerði 6, Tórshavn til sølu

Sethús á Øksnagerði 6, Tórshavn, verður hervið lýst til sølu.

Talan er um eini nýggjari einbýlishús frá 1986 við stovu- og loftshædd, umframt at bilhús er bygt afturat.

Stovuhæddin er 106 m² og umfatar stóra inngongd v/trappu, stóran køk, stóra stovu, har ein partur er niðursenkaður, niðursenkað sjónvarpsrúm/kamar, kamar, lítið WC og fýr-/vaskirúm har útgongd eisini er til bilhús.

Loftshæddin er nakað minnið enn stovuhæddin við tað, at hon ikki umfatar vestasta endan av sethúsinum. Í loftshæddini er gongd, trý sovikømur og hjúnarúm. Frá hjúnarúminum er atgongd til eitt baðirúm, umframt eitt lítið klædnarúm. Frá gongini er eisini atgongd til baðirúm, sum tó ikki er liðugtgjørt.

Grundøkið er 500 m²

Húsið, ið stendur væl fyri í veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvi, verður selt, um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tel 311260 · Fax 311261
advokatfelagid@kallnet.fo

## Toll- og Skattstova Føroya
**Stýrið**

### Fyribilsskráseting 2006

Skal fyribilsskatturin verða rættur, mugu vit hava rættar upplýsingar um B-inntøku og frádráttir.

**B-inntøka**
B-skatturin í 2006 verður roknaður út frá teimum upplýsingum, tú hevur givið á sjálvuppgávuni 2004.

Er B-inntøkan broytt í 2005, verða broytingarnar tiknar við í fyribilsskattaskránna 2006.

**Frádráttir**
Hevur tú frádráttir, er neyðugt at upplýsa okkum um teir.

**DIS-skipanin**
Siglir tú, ella fert tú at sigla undir DIS-skipanini, eigur tú at fyribilsskráseta teg við arbeiðseftirlønargjaldinum, sum svarar til 1% av væntaðu DIS-inntøkuni.

**Rættingar/fráboðanir**
Oyðublað til at rætta ella skráseta fæst á Toll- og Skattstovuni, í peningastovnum, á posthúsum, og kann verða heintað á heimasíðuni: www.tollskatt.fo

Tú ert vælkomin at fáa upplýsingar um, hvørjar skrásetingar vit hava um tíni skattaviðurskifti.

á Argjum, 6. januar 2006

# Musikkskúla-skipanin

Musikkskúlaskipanin søkir eftir guitarlærara/um at byrja beinanvegin og fram til 31. mai 2006.

5 klokkutímar um vikuna í Sandoyar Musikkskúla
4 klokkutímar um vikuna í Nes Sóknar Musikkskúla
4 klokkutímar um vikuna í Klaksvíkar Tónlistarskúla

Lokið prógv frá musikkkonservatorium krevst. Onnur kunnu tó søkja.

Setanar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Musikklærarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Meira - um tíðir og støð - fæst at vita hjá leiðaranum Martin Mouritsen á tlf. 216462.

**Musikkskúlaskipanin**
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn · Tlf. 316462
Teldupostur: martin@mmr.fo
www.musikkskulin.fo

# Adressur í Vágs kommunu

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri Vág og Nes í Vágs kommunu góðkend.

Skráin er almenn og tøk á www.matrikul.fo

**Landsadressuskráin**
Boks 327 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 357900 · Fax 357901
www.matrikul.fo · post@matrikul.fo

# Hús í Vestmanna

til sølu.

**Tlf. 424600 ella 229113**